# VEKINGAR - MØTIR



## í Kelduni 7.-10. mars

| | |
|---|---|
| Týskvøld | kl. 19.30 |
| Mikukvøld | kl. 19.30 |
| Hóskvøld | kl. 19.30 |
| Fríggjakvøld | kl. 19.30 |

*Rodney & Adonica Howard Brown*

EVANGELISKA SAMTAKIÐ
**KARISMA**
& REVIVAL MINISTRIES INTERNATIONAL

**Øll eru hjartaliga vælkomin**

# Pedagogur til Dagstovnin Mýrifípan

**Stovnslýsing:**
Á Mýrifípuni ganga 95 børn í aldrinum 0-7 ár. Stovnurin er skipaður í 5 eindir, ein vøggustova, tríggjar barnagarðsstovur, harav ein hálvdagsstova, ein heildagsstova og ein útibarnagarðsstova.

**Starvið:**
Talan er um eitt avloysarastarv á bláu stovu, 32 tímar um vikuna fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi. Starvið verður sett fyribils frá 27. mars til 30. juni 2006. Bláa stova er ein heildagsstova við 20 børnum í aldrinum 3-6 ár.

**Vit vænta av tær:**
- at tú hevur góð samstarvsevnir og ert álítandi
- at tú vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- at tær dámar væl at verða úti í náttúruni, sum er ein nattúrligur partur av gerandisdegnum
- at tú hevur yvirlit í arbeiðinum
- at tú tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- at tú ert nærverandi og vísir umsorgan
- at tú vísir áhuga og ynskir at mennast í arbeiðinum.

**Lønarviðurskiftir:**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um pedagogar ikki fáast til størvini, verða hjálparfólk sett tíðaravmarkað.
Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran ella varaleiðaran á tlf. 372700.

**Umsókn,** saman við upplýsingum um útbúgving, arbeiðsroyndir og møguligum viðmælum, skulu vera Stovninum Mýrifípuni, FO-826 Trongisvágur í hendi í seinasta lagi hósdagin 23. mars 2006 kl. 12.00.

um hóskandi boð fæst verður
**OGNIN UNDIR BRYGGJUBAKKA 23**
**lýst til sølu**



Grundøkið er íalt 243 m² til støddar og hevur ábygt pakkhús í trimum hæddum.

Matr.nr. eru 168 a-b og 161 a Tórshavn

Áhugað kunnu venda sær til:
**ADVOKATGARÐIN**
Bringsnagøta 21, Tórshavn
Tel 311744, avgr.tíð: má.- fr. 10-16

**Hoyvíkar Skúli**

# Endurlýsing

**eftir lærara til Hoyvíkar skúla**

Vegna fáar umsóknir verður vikarstarvið fyri lærara í barnsburðarfarloyvi lýst av nýggjum. Starvið skal setast sum skjótast og verður restina av skúlaárinum.

Undirvísingin er 19 tímar um vikuna á 6. árgangi í føroyskum, søgu, ítrótti og heimkunnleika.

Lønt verður eftir sáttmála við fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving og royndum skulu sendast til:
**Hoyvíkar skúla**
**Postrúm 3073**
**110-Tórshavn**
áðrenn 14. mars.

Nærri fæst at vita við at venda sær til skúlastjóran á telefon 302590 ella 227603.

Ikki er neyðugt hjá umsøkjarum, sum longu hava søkt, at søkja umaftur. Tær umsóknirnar verða eisini viðgjørdar.

**Birgit Arge**
Skúlastjóri
Hoyvíkar Skúli

# SETHÚS TIL SØLU



Um nøktandi boð fæst verður sethúsaognin matr. nr. 135 fs, Hoyvík, ið liggur Torkilsgøta 7, 188 Hoyvík, seld. Sethúsaognin liggur í friðaligum og barnavinarligum umhvørvi.

Áhugaði kunnu venda sær til skrivstovu okkara.

**Djóni Thomassen**
**djoni@advokat.fo**

**Advokatfirma**
v/Annfinn V. Hansen · Bryggjubakki 22 · Postsmoga 106
FO-110 Tórshavn · Tel 359595 · Fax 359596
advokat@advokat.fo · Opið: 9-12 & 13-16

# Innskriving

**av børnum til frítíðarskúlan í Vági**

Børn, ið skulu í frítíðarskúla komandi skúlaár, kunnu skriva seg inn frá viku 11 2006.

**Frítíðarskúlin**
Tlf. 229482

**Internet Sosialurin**